# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Læknavaktina

Eitt starv sum sjúkrarøktarfrøðingur á starvsbrøki 0,4 er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Deildin umfatar:**
- læknavaktarskipan í tíðarskeiðinum kl. 16.00-08.00 allar dagar, umframt dagtímarnar í vikuskiftum og halgidøgum

**Arbeiðsøkið í høvuðsheitum:**
- Læknavaktin heldur til á Landssjúkrahúsinum og umfatar miðstaðarøkið, t.v.s. Streymoy, Eysturoy, Norðoyggjar, Vágoy, Sandoy, Nólsoy, Hest, Koltur, Dímun og Mykines. Seinni verður skipanin møguliga víðkað
- umfatar røkt og viðgerð til sjúklingar, ið seta seg í samband við læknavaktina

**Vit kunnu bjóða:**
- innleiðslu og upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- gott og positivt arbeiðsumhvørvi

**Krøv til umsøkjararnar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligur áhugi í viðgerð og røkt av sjúklingum við bráðfeingis tørvi
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og jaligur
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- má kunna arbeiða í skiftandi vaktum, tó mest kvøldvaktir og vikuskiftisvaktir

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- fakligar royndir at viðgera og røkta sjúklingar við bráðfeingis tørvi
- minst 2 ára royndir á medisinskari og/ella kirurgiskari seingjardeild
- arbeiðsroyndir hjá kommunulækna ella líknandi fakliga breiðar royndir

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Hans Jacob Simonsen, leiðandi yvirlækna á Bráðdeplinum, lokal 5700.

**Umsóknarfreistin er 15. mars 2010 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingur til neurologiskt ambulatorium

Á Landssjúkrahúsinum er eitt nýtt fulltíðar projektstarv á nýstovnaða neurologiska ambulatorinum leyst at søkja til setan 1. apríl og eitt ár fram. Neurologiska ambulatoriið er ein partur av medisinska ambulatorinum, har arbeitt eisini verður við gransking.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- at verða við til at gera mál og framtíðarætlanir í tøttum samstarvi við deildar- og depilsleiðsluna
- at ráðgeva, upplæra og vegleiða sjúklingar og avvarandi
- at hava dagligu viðgerðina og røktina um hendi
- at arbeiða fyribyrgjandi og stuðlandi fyri sjúklingin og avvarandi
- at arbeiða í tøttum tvørfakligum samstarvi við aðrar fakbólkar
- at verða við til at menna Ambulatoriið frá byrjan

**Vit vænta, at tú:**
- hevur góð samstarvsevni
- ert jaglig/ur og opin fyri avbjóðingum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir í tøttum samstarvi við deildar- og depilsleiðslu

**Vit bjóða:**
- eitt nýtt starv, har tú sjálv/ur fært ávirkan á títt arbeiði
- møguleika fyri at menna teg fakliga eftir tørvi

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðingur
- kunnleiki til neurologi

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á medisinska deplinum, lsingga@ls.fo, tlf. 304599, lokal 6102 ella til Evu M.Holm, deildarleiðari á medisinska ambulatoriinum lsevamo@ls.fo, lokal 6250

**Umsóknarfreistin er 22. mars 2010 kl. 12.00**

## Læknaskrivari til Eygnadeildina

Á Skurðdeplinum er eitt nýtt og spennandi fulltíðar læknaskrivastarv á Eygnadeildini leyst at søkja til setan 1. mai 2010.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum læknaskrivari
- Dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- Góður røkjuskapur
- Góð samstarvsevni
- Teldukunnleiki. Cosmic ein fyrimunur

**Vit kunnu bjóða:**
- góða innleiðslu
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga komptentar og virknar starvsfelagar
- postivt tvørfakligt samarbeiði

Nærri fæst at vita við at ringja til til Marnu Gásadal, leiðandi læknaskrivara, telefon 304500, lokal 5361 ella til Jan J. Poulsen, leiðsluskrivara á telefon 304500, lokal 5103

**Umsóknarfreistin er 22. mars 2010 kl. 12.00**

## Yvirlækni til Oyrna- nasa- og hálsdeildina

Eitt starv sum síðustillaður yvirlækni í Oto-rhino-laryngologi í Oyrna-nasa- og hálsdeildini er leyst til setan 1. apríl 2010 ella eftir avtalu. Tað eru tvey yvirlæknastørv á deildini.

Til Oyrna- nasa- og hálsdeildina er tilknýtt ein hoyriklinikk. Tað eru felags seingjardeildir, skurðøki og forvakt við aðrar deildir á Skurðdeplinum. Hetta umfatar parenchymkirurgi, ortopedi, gynækologi-obsterik, eygnadeild og tannklinikk.

Árliga eru tað poliklinisk umleið 5.000 brúkarar, íroknað ambulantar eftirviðgerðir og eftirsýn frá øðrum deildum, umleið 500 innleggingar og umleið 600 skurðviðgerðir, íroknað dagskurðviðgerðir. Kompliseraðar uppgávur verða viðgjørdar í samstarvi við Oyrna-nasa- og hálsdeildina hjá Ríkissjúkrahúsinum.

**Førleikakrøv:**
Ynski er um, at starvið verður sett av einum breitt útbúnum serlækna í Oto-rhino-laryngologi.

**Lønar- og setanarviðurskifti** smb. avtalu millum FAS og Fíggjarmálaráðið. Setanin fer fram við eini royndartíð uppá 2 ár.

**Fleiri upplýsingar** um starvið kunnu fáast við at seta seg í samband við Bjarka Ellefsen, yvirlækna, tlf. +298304500, lokal 5367.

**Umsókjarafreistin er 22.mars 2010**

## Áður lýst størv

**Sjúkrarøktarfrøðingur til A2/Føðideildina**
Umsóknarfreistin er 8. mars 2010 kl. 12.00

**Radiografar/Røntgensjúkrarøktarfrøðingar**
Umsóknarfreistin er 8. mars 2010

**Bioanalytikarar**
Umsóknarfreistin er 12. mars 2010 kl. 12.00

**Maskinmeistari**
Umsóknarfreistin er 15. mars 2010 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðdeildina G1**
Umsóknarfreistin er 15. mars 2010 kl. 12.00

**Summarfrítíðaravloysarar 2010**
Umsóknarfreistin er 20. mars 2010

**Yvirlækni til Eygnadeildina**
Umsóknarfreistin er 26. mars 2010

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn
ella við telduposti til umsokn@ls.fo







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

· er sjúklingurin í miðdeplinum
· eru umleið 180 seingjarpláss
· eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
· eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
· eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi

Landssjúkrahúsið J.C. Svabos gøta 100 Tórshavn Tel 30 45 00 Fax 31 42 53 umsokn@ls.fo www.ls.fo